gult cyan magenta svart

Dráttur — Mjølnir 3 — 1 (5-20, 25-23, 22-25, 25-23)

Fyrstu fer› í 4 ár

Dráttur vann t‡dningarmikla oddadystin móti Mjølni, so nú er aftur fullkomliga javnt í oddinum í bestu føroysku kvinnudeildini í flogbólti

FLOGBÓLTUR

Ta› er sagt fyrr. Kappingin um gulli› fer at standa millum Mjølnir og Drátt. Sum er, eru hesi bæ›i li›ini betur fyri og hava sterkari manning enn hini. At Mjølnir er í toppinum er sjálvsagt. Ta› eru tær altí›, men í ár sær út til, at ta› ver›ur heldur torførari enn vanligt at vinna gulli›.

Dráttur hevur vi›rák

Í Drátti hevur framgongd veri› seinastu árini. Landskappingin seinasta kappingarár gekk rættiliga væl, og li›i› spældi seg í steypafinaluna, men har taptu tær tó fyri Mjølni. Í felagnum hevur veri› arbeitt nógv fyri at fáa fíggjarligu karmarnar solei›is, at venjari fekst til hetta kappingarári›, og ta› eydna›ist. Úrslitini eru komin vi› venjaranum, og áhugin millum manna í Vágunum er nú eisini komin. Einir 100 ásko›arar vóru í høllini á Giljanesi og hugdu at hesum dystinum, og lagi› var sera gott. Teir fingu undirhald, tí dysturin var ein sannur "gysari".

Mjølnir gó›a byrjan

Mjølnir kom framum í øllum settunum. Ágangandi servur og hart álopsspæl syrgdu fyri tí, men Dráttur kom so lí›andi fyri seg og vann lei›sluna inn aftur. Í fyrsta settinum var Mjølnir frammanfyri til mi›skei›is í settinum. Li›ini toga›ust nú eina løtu, men fjølbroytt álopsspæl frá Drátti og nakrar villur hjá Mjølni avgjørdu hetta setti›. 5 stig vóru á muni, og ta› var ta› mesta í dystinum.

Í 2. setti var gongdin tann sama, men nú helt Mjølnir longur á. Tær vóru frammanfyri 23-21, og tá plagar Mjølnir at vinna. Ta› var kanska eisini ta› sum var trupulleikin. Kvinnurnar í Mjølni eru so vanar at vinna, at mótstø›a sum í hesum dystinum er óvanlig. Dráttur megna›i at vinna hetta setti› eisini, so nú lá bara heilt væl fyri.

Sum í Klaksvík

Í dystinum í Klaksvík millum hesi li›ini, var stø›an tann sama. Dráttur var frammanfyri 2-0, men so tók Mjølnir yvir. Ta› sama var í hesum dystinum.

Vi› Marjun Kalsø á odda, sum hevur heva› á li›num í nógv ár, bardi Mjølnir seg inn aftur í dystin. Margit Joensen spældi á kantinum, og hon var besta álopi› hjá Mjølni. Serliga smashini beint oman eftir linjuni eydna›ust væl. Tina Jacobsen, sum spælir á mi›juni hevur havt ska›a, og hon var als ikki so sjónlig, sum hon plagar. Tí gekk nógv spæl ígjøgnum kantsmashararnar. 3. setti› var eins og hini sera javnt, men nú eydna›ist Mjølni at vera frammanfyri allan vegin upp í 25.

Spennandi endi

Fjáltur var nú um at koma á Drátt og ásko›ararnar í høllini. Skuldi ta› heldur ikki eydnast ídag? Dráttur hev›i ikki vunni› landskappingardyst ímóti Mjølni í 4 ár, so tapi› lá og lúrdi.

Hetta setti› var tí merkt av fjáltri frá bá›um sí›um. Í øllum dystinum høvdu kvinnurnar í Mjølni gjørt fleiri mistøk enn tær plaga. Smash fóru útum og í neti›, og eisini nógvar servur vóru misn‡ttar. Hetta setti› var einki undantak í so máta, men tó var Mjølnir frammanfyri 23-21 fyri a›ru fer› í dystinum. Dráttur vann servuna, og 19 ára gamla Sólger› Henriksen fór aftur at serva. Hon spælir á mi›juni, og hev›i í dystinum sta›i› seg væl. Hon avgjørdi dystin vi› 4 sera gó›um servum, sum kvinnurnar í Mjølni ikki fingu nóg væl fram til hevaran til at rættiligt álop fekst í lag.



Líkt er nú til, at einki sum helst ver›ur avgjørt, fyrr enn endaspæli› er spælt á tamb í bestu kvinnudeildini
savnsmynd

Sjálvandi var rómurin á spælarunum og á ásko›arunum í høllini stórur. Dráttur tók t‡andi stig í landskappingini, og framtí›in sær ljós út. Gerda Nattestad, sum var ein at stu›lunum seinasta kappingarár fer nú at spæla vi› aftur, eftir at hon hevur veri› burturstødd. Ta› fer at styrkja um li›i› enn meira. Mjølnir tapti henda dystin, men ta› er eingin ólukka. Ta› er bara spennandi hjá okkum sum fylgja vi› flogbólti, at Mjølnir fær kapping, og ta› hava tær helst einki ímóti sjálvar.



flobgóltur, kvinnur
Eftir at tær taptu fyrst dystirnar, hevur Fleyr nú toga› seg úr botninum vi› trimum sigrum á ra›
Mynd: Álvur Haraldsen

Fleyr — TB 3 — 2 (21-25, 25-22, 25-9, 21-25, 15-7)

3. sigur á ra›

Eftir eina ræ›uliga byrjan, hava Fleyr-kvinnurnar av álvara fingi› gó›an byr›, og leygardagin vór›u ta› ungu TB-kvinnurnar, sum gjørdust offur fyri hesum

FLOGBÓLTUR

Fleyr hevur rættiliga fingi› gongd á spæli›. Nú kappingin er komin í helvt í fyrru hálvu, hevur Fleyr toga› seg fram á 3. pláss. Ta› sá annars svart út eftir tvey tey fyrstu umførini, men nú hevur li›i› vunni› tríggjar dystur á ra›.

Fleyr skuldi hevna TB ósigurin í Trongisvági. Ta› sá annars einki út, tí TB vann 1. sett. Grundspæli› hjá TB er gott. Tær taka rættiliga væl ímóti, og fáa nógvar bóltar aftur í spæl, men sjálvt álopi› hjá teimum er heldur tunt. Fleyr hev›i allan dystin tey betru og har›aru álopini, men TB vardi seg væl og tær megna›u vi› gó›um lobbum og annars tryggum spæli at halda lív í dystinum.

Fleyr hevur serliga tvær álopshóttanir. Tær eru Miriam á mi›juni og Andrea á kantinum. Andrea var í hesum dystinum besti leikari, og hon var stø›ug hóttan og vann nógv álop. Sum dystinum lei› gjørdist hon meira og meira avgerandi fyri úrsliti›.

Unga TB-li›i› var vi› alla tí›ina og tær megna›u at vinna 4. sett, eftir at tær høvdu tapt 3. sett so ruddiliga. Ta› er væl klára› at koma inn aftur í ein dyst, eftir at hava tapt setti› undan 25-9! Uppskriftin var alla tí›ina tann sama. Einfalt og trygt spæl.

Makta›u ikki meira

Dysturin skuldi nú avgerast, men beinanvegin var greitt, at Fleyr var betur fyri. TB hev›i brúkt allar kreftirnar í 4. setti, og nú var einki eftir. Fleyr vann trygt, tí tær høvdu fleiri álopsmøguleikar, og ikki minst tí dysturin var í Gundadalshøllini. Kanska TB hev›i havt funni› eyka kreftir, um dysturin var› spældur í Trongisvági, men samanumtiki› var Fleyr betra li›i› henda dagin.

Fleyr – Fram 3 – 1 (25-14, 19-25, 25-20, 25-20)

Fleyr hamskift

Fleyr s‡ndi satt meistaraspæl, tá teir vi› einum sigri í grannauppger›ini aftur setti spenningin í hásæti

FLOGBÓLTUR

Føroyameistararnir í Fleyr hava higartil í landskappingini als ikki megna› at víst sama flótandi spæli› sum seinasta kappingarár. Heilt gali› var seinasta vikuskifti, tá i› ÍF fullkomuliga gjørdi Fleyr fyri skommum í Gundadalshøllini. Ta› skuldi ikki endurtaka seg.

Yvirlegnir?

Hjá Fram hevur ligi› væl fyri í ár, og allir dystirnir eru enda›ir vi› sigri. Li›i› er væl manna›, men tó eru ávísir veikleikar at hóma. Millum anna› liggur ikki so væl fyri hjá øllum at venja regluliga, og hjá landsli›sleikaranum Ragnari Petersen hevur spæli› gingi› heldur illa. Li›i› hevur Rúna Weihe sum stóra profilin, men ímóti Fleyr var hann als ikki sum hann plagar.

Dysturin koppa›i til fyrimuns hjá Fleyr beinanvegin. Sum so ofta fyrr var Klæmint óførur í servuni. Ikki vóru ta› hoppservurnar, sum vóru vápni› hesafer›. Ísta›in fór hann langt aftur um vøllin og serva›i langar har›ar servur, sum sveima›u nógv og gjørdu ta› torført hjá Jens Hera og Rúna í Fram at taka ímóti. Hetta var gongdin allan dystin, og ikki er ta› langt av lei›, at Fleyr vann eini 20, stig av tí at móttøkan hjá Fram enda›i uttanfyri vøllin.

Stóri trupulleikin hjá Fram var tó, at menn als ikki vóru nóg uppsettir til dystin og tóktust næstan yvirlegnir. Í hvussu er vóru teir ikki líka uppsettir sum leikararnir í Fleyr. Í øllum settunum tók Fleyr seg framum, og teir tóktust at hava sett sær fyri, at hesin dysturin skuldi vinnast. Klæmint gekk undan, og hann var eisini stóri leikarin í dystinum. Hann vann at kalla allar hevingarnar hann fekk. Stóri blokkurin hjá Fram megna›i ikki at fanga smashini frá honum, tí annahvørt sló Klæmint í blokkin og út ella vi› sí›una av blokkinum.

Fleyr í hopla

Alt fleyrli›i› var í hopla henda dagin. Ungu leikararnir royndust væl, og nú er gó›i gamli Jóannes Eidesgaard aftur farin at spæla, og hann styrkir hvat li› ta› skal vera. Sum spæli› hjá Fleyr gekk leygardagin, kann li›i› saktans vera vi› í gullstrí›num. Fram hev›i ein av teimum døgunum, tá i› einki ber til. Móttøkan var út av lagi, og sjálvt Rúni Weihe sló út og gjørdi mistøk. Alt li›i› misti móti›, og bara í 2. setti vísti li›i› naka› av tí, teir hava víst í hinum dystunum í ár. Fleyr megna›i tó skjótt at fáa taki› aftur á dystinum, og sigurin var fult uppiborin og kom væl vi›.

Stø›an,meistaradeild menn

Stø›an Li›	Dystir leiktir	Sett vunnir	* taptir	vunnin	tapt	munur	Stig
Fram	4	3	1	10	6	4	6
Mjølnir	3	2	1	8	4	4	4
Fleyr	4	2	2	7	8	-1	4
ÍF	3	2	1	7	4	3	4
SÍ	4	0	4	2	12	-10	0

Stø›an, meistaradeild kvinnur

Stø›an Li›	Dystir leiktir	Sett vunnir	* taptir	vunnin	tapt	munur	Stig
Mjølnir	4	4	0	12	2	10	8
Dráttur	4	3	1	11	4	7	6
Fleyr	5	3	2	10	9	1	6
TB	5	2	3	9	10	-1	4
ÍF	4	1	3	4	9	-5	2
Fossánes	4	0	4	0	12	-12	0

Fleyr-leikararnir spíla›u seg rættiliga út, tá ta› leygardagin eydna›ist at koppa Fram fyri fyrstu fer› hetta kappingarári›
Mynd: Álvur Haraldsen

Jens Martin aftur í NSÍ

Í Runavík rokna teir vi› sama fólkinum, sum sí›sta kappingarári› vann teimum fjór›a plássi

Stóra fótbóltssøgan í vikuskiftinum hevur veri›, at Jens Martin Knudsen hevur gjørt sáttmála vi› NSÍ. Sambært heimasí›una hjá NSÍ er avtala gjørd millum felagi› og Jens Martin Knudsen um, at landsli›smálma›urin hevur tey næstu árini skal verja máli› hjá teimum, umframt at hann skal hava ábyrgdina fyri ungdómsvenjingini. Ta› vil siga, at hann skal samskipa venjingina og vera vi› til at leggja hana til rættis.

Í undanfarna kappingarári hildu teir í NSÍ seg fleiri fer›ir missa mál, stig og sigrar, tí málmansspæli› ikki var nóg stø›ugt og sannførandi. At teir hava fingi› Jens Martin Knudsen í felagi› hevur í hvussu so er vi› sær, at teir hava fingi› ein málverja, sum hevur fleiri royndir enn nakar annar málverji í føroysku kappingini.

– Vit eru sera fegnir um, at ta› hevur eydnast at gera eina avtalu vi› Jens Martin Knudsen. Vit rokna vi›, at allir spælararnir, sum vóru í hópinum sí›sta kappingarár, fara at halda fram komandi ár. Kanska vera onkrar broytingar, men talan ver›ur ikki um størvegis broytingar, sigur Hans Petur Ellingsgaard vi› heimasí›una hjá NSÍ. Hans Petur er forma›ur í lei›slubólkinum hjá NSÍ.

Drúgvar royndir

Felags ey›kenni fyri teir, sum sí›sta kappingarár vóru vi› til at manna li›i› hjá NSÍ, var, at teir hava spælt í fleiri ár í bestu deildini, og at teir ikki hava havt høvi at royna seg í altjó›a fótbólti – hvørki í Europa Cup ella á landsli›num. Jens Martin Knudsen hevur allar tær royndirnar, sum n‡ggju li›felagarnir hjá honum ikki hava.

Jens Martin Knudsen er 33 ára gamal. Hann kom á besta li›i› hjá NSÍ í 1985, og burtursæ› frá 1986–1987, tá hann var í Frederikshavn, var hann í barndómsfelagnum inntil hann í 1992 fór til GÍ. Í 1998 flutti Jens Martin úr GÍ og til Leiftur á Ólafsfir›i í, har hevur hann veri› sí›ani. Sí›sta kappingarár, tá Leiftur flutti ni›ur í næstbestu deildina,var hann spælandi venjari. Fyri einum lítlum ári sí›ani var ta› heilt tætt vi›, at Jens Martin skriva›i sáttmála vi› ÍBV í Vestmannaoyggjunum. Nú tykist uttanlandsskei›i› hjá veteraninum, sum hevur veri› 51 fer›ir á landsli›num, at vera av. Ringurin er samanrunnin, nú Jens Martin er aftur í barndómsfelagnum.

jh

gult cyan magenta svart